## Lærarastarv

Vegna barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir lærara til Felagsskúlan á Oyrarbakka

Starvið er tíðaravmarkað frá 7/1 til 11/10-2002.

**Lærugreinir:**
- Danskt
- Enskt
- Tilevning
- Heimkunnleiki

í framhaldsdeildini.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til skúlastjóran, tlf. 422084 ella 423098.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknir og ljósrit av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi hósdagin 3. januar 2002.

**Skúlastýrið fyri Felagsskúlan á Oyrarbakka**
v/Mariu í Skorini
FO-470 Eiði



## Íbúð til leigu

í miðbýnum í Havn.

**Tlf. 212118**



**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

## Læknaskrivari til Tuberklastøðina

Fast heiltíðarstarv sum læknaskrivari á Tuberklastøðini er leyst at søkja til setan frá 1. februar 2002 ella eftir avtalu.

**Førleikakrøv:**
- útbúgving sum læknaskrivari
- tænastusinni
- evni at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni
- góður røkjuskapur

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Jón á Steig, leiðandi yvirlækni, telefon 313540, lokal 241 (L).

Umsóknarfreistin er: **4. januar 2002, kl. 12.00.**

Skivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til:

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
J. C. Svaboesgøta
100 Tórshavn



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Sløkkiliðsstjóri

Tórshavnar kommuna søkir eftir sløkkisliðsstjóra at byrja skjótast gjørligt.

**Starvið/ábyrgd**
Sløkkiliðsstjórin hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni á brandstøðini og verkstaðnum.

Sløkkiliðsstjórin hevur tilvísing til tekniska stjóran og í sambandi við brunanevndina borgarstjóran, sum er formaður í nevndini.

**Høvuðsuppgávur**
- Umsitingarligur støðleiðari
- Lógarkravdur limur í brunanevndini
- Skrivari í brunanevndini
- Brunateknisk byggimálsviðgerð/umsjón
- Fíggjarliga ábyrgd
- Tilbúgvingarætlan
- Starvsfólkarøkt
- Útbúgving og venjing hjá sløkkiliðsmanningini
- Skipa fyri skeiðum
- Umboð býráðsins í bólkinum viðvíkjandi koyring fyri MBF

**Førleikakrøv**
Roknað verður við, at umsøkjarin hevur:
- førarabræv til akfar yvir 3.500 kg
- víðkað prógv í fyrstuhjálp
- heilsuváttan fyri sløkkiliðsfólk
- prógv frá sløkkistjóraskúla við nøktandi úrsliti sum brunaumsjónarmaður (brandinspektør). Hevur tú ikki prógvið, skal tað takast innan 2 ár
- nøktandi revsiváttan
- áræði, arbeiðssemi, góð samstarvsevnir og er fyrikomandi.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er starvsmannastarv og lønt í 35. lønarstigi í tænastumannasáttmálanum.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Marius Müller, tekniska stjóra ella Janus Isfeldt, lønarfulltrúa, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum, skulu vera Tórshavnar kommunu, Postrúm 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 14. januar 2002. Viðmerk á umsóknina "Sløkkiliðsstjóri".

SNARSKIVAN



**Sjúkrasystraskúli Føroya**
Fo 100 Tórshavn

## Deildarleiðari – sjúkrasystraútbúgvingin

Starvið sum deildarleiðari fyri sjúkrasystraútbúgvingina er leyst til setan frá 1. mars 2002 ella eftir avtalu.

**Høvuðsuppgávur hjá deildarleiðaranum**
- Vararektari tá rektarin er burturstaddur
- Gerð av útbúgvingarætlan og leggja arbeiðið til rættis
- Námsfrøðiliga og fakliga ábyrgd av sjúkrasystraútbúgvingini
- Viðgera mál viðvíkjandi lesandi
- Menningaruppgávur
- Undirvísa uml. helvtina av arbeiðstíðini

Starvið er eitt spennandi starv við stórum avbjóðingum. Tann, ið settur verður, verður somuleiðis við til at skapa sjálvt starvið, eins væl og ta víðari menningina á skúlanum.

**Førleikakrøv:**
- Sjúkrasystir við viðkomandi framhaldsútbúgving t.d. cand.pæd., cand.cur. e. l.
- Vitan um útbúgvingarviðurskifti innan heilsuøkið
- Royndir innan námsfrøði og leiðslu til at røkja ta fakligu og námsfrøðiligu leiðsluna av sjúkrasystraútbúgvingini
- Dentur verður lagdur á samstarvsevni serliga við atliti til at vera viðvirkandi til at skapa eitt mennandi lestrarumhvørvi fyri lesandi og lærarar.

Sjúkrasystraskúli Føroya var í 2000 útbygdur til eisini at fata um almanna- og heilsuútbúgvingarnar og hevur sostatt tvær útbúgvingarrásir: sjúkrasystraútbúgvingin og almanna- og heilsuútbúgvingarnar.

Hvør rásin sær hevur ein deildarleiðara við fakligari og námsfrøðiligari ábyrgd.

Sjúkrasystraútbúgvingin fer fram í Havn og Almanna- og heilsuútbúgvingarnar á Tvøroyri.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Sjúkrasystrafelag Føroya.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Bergliot Ihlen, rektara, tlf. nr. 316027 lokal 436. Umsóknin við CV, prógvum o.ø. verður at senda til:

**Sjúkrasystraskúla Føroya**
Att.: Mentamálastýrið
Eirargarður 14 B
100 Tórshavn

Umsóknarfreistin er: **28. januar 2002.**



The Windsmith
v/ John S. Müller



**Ring og royn**
**eitt blásaraljóðføri við ráðgeving frá útbúnum og royndum fakmanni**

**Søla**
**Nýggj Yamaha blásaraljóðføri tøk**

**Tænasta**
**3 mðr. ókeypis fínstilling av ljóðførum, sum latin eru av blásaraverkstaðnum við Marknagilsvegin 18**

*fartlf. 219721 · e-mail: windsmit@post.olivant.fo*




Aftur til Múla-sendirøðin:

# Ein tann dýrasta útvarpið hevur sent

**Men allíkavæl kostaðu sendingarnar útvarpinum eina krónu. Fíggingin hjá Studio Pegasus úr Klaksvík kom øll úr Mentamálastýrinum, sum stuðlaði verkætlanini so dyggiliga. Nú er sjónvarpútgávan av sendingini seld til Sjónvarp Føroya. Keypsprísin hevur okkum ikki eydnast at fáa uppspurt**



*Múli var bakgrund fyri nakrar tær dýrastu sendingarnar útvarpið nakrantíð hevur sent*

*Savnsmynd*

BAKGRUND
*Ingrid Bjarnastein*

Sendingarnar, Aftur til Múla, sum Studio Pegasus í Klaksvík gjørdi, teljast millum dýrastu sendingarnar Útvarp Føroya hevur sent. Aftur til Múla senidingarnar, ið vóru 8 í tali, vóru allar fíggjaðar við stuðli frá Mentamálastýrinum

Raðsendingin Aftur til Múla varð tikin upp í summar. Tríggjar vóru familjurnar, sum vórðu sendar til Múla við einum liði av teknikarum og fjølmiðlafólkum, og skuldu hesar familjur liva avbyrgdar frá samfelagnum í útdeyðu bygdini Múla í eina viku. Ongin telefon, onki útvarp, onki sjónvarp, ongin telda, ongin fartelefon. Stutt sagt: onki samband við útheimin í eina viku.

Hesar átta múlasendingarnar vórðu so sendar í Útvarpi Føroya í heyst. Tilsamans vóru átta sendingar við múlatilfari. Hesar átta sendingar teljast millum dýrastu sendingarnar, ið hava verið sendar í Útvarpi Føroya. Og tó so. Útvarp Føroya skuldi ikki gjalda nakað fyri tær, tí tær vórðu fíggjaðar við stuðli frá Mentamálastýrinum. Studio Pegasus fekk 178.000 krónur til verkætlanina frá Mentamálastýrinum, og gevur hetta eitt miðal tal á umleið 22.500 krónur fyri hvørja sending. Hetta vísa skjøl, sum Sosialurin hevur fingið innlit í frá Mentamálastýrinum.

Vanliga kosta útvarpssendingar frá nøkrum hundrað krónur upp í nakrar túsund krónur at framleiða. Tað eru bert tær heilt stóru sendingarnar við nógvum luttakarum og øðrum, sum verða dýrari. Múlasendingarnar eru tó fyribils tann einastu sendingarnar, sum eru sendar í ÚF á henda hátt. Ikki tí. Útvarpssendingar kunnu eisini koma heilt upp í 30.000 krónur í framleiðslukostnaði. Tá er talan um til dømis valsendingar, sum verða varpaðar út beinleiðis frá nógvum støðum í Føroyum.

– Hetta er avgjørt ein tann dýrasta sendingin, sum er send í útvarpinum, sigur Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri.

– Mentamálastýrið gav í fjør eina játtan uppá 1,0 milliónir krónur til útvarps- og sjónvarpstilfar. Útvarpssendingarnar, Aftur til Múla, er so ein av útvarpssendingunum, sum hevur fingið pening frá hesi játtan. Eisini sjónvarpið hevur fingið pening til sjónvarpsendingar frá somu játtan, sigur Jógvan Jespersen.

# Pegasus framleiðir sjónvarpssendingar

**Studio Pegasus hjá Steintóri Rasmussen í Klaksvík er nú farið undir at framleiða sjónvarpstilfar. Tvær sendingar úr Múla eru seldar Sjónvarpi Føroya, og Pegasus hevur annars sýnt áhuga at gera tilfar til sjónvarpið**



*Steintór Rasmussen hevur keypt sjónvarpsútgerð til Studio Pegasus, og tvær tær fyrstu sendingarnar eru longu seldar sjónvarpinum. Hann vil tó ikki leggja ov hart út, men heldur bíða eftir, hvat kann spyrjast burtur úr*

SJÓNVARP
*Stefan í Skorini*

Stjórin í Sjónvarpi Føroya, Mikkjal Helmsdal, váttar, at hann hevur tikið avgerð um at keypa tvær sendingar frá Studio Pegasus. Hesar sendingar eru tiknar upp í Múla, tá Steintór saman við hinum í Pegasus gjørdi sendingarnar »Aftur til Múla« til Útvarp Føroya.

Mikkjal Helmsdal sigur, at hetta er ein roynd at byrja við, og síðani fæst at síggja, hvat kemur burturúr. Hann leggur tó dent á, at samstarvið millum SVF og Pegasus ikki verður sum samstarvið við ÚF, tí tað er meira krevjandi at gera sjónvarp enn útvarp.

Hann sigur, at sjónvarpið ikki hevur nakað ímóti at samstarva, so leingi fíggjarorkan er til tess, um Pegasus kanska kann gera áhugaverdar sendingar.

Sendingarnar til útvarpið vóru átta í tali og hava verið í luftini. Til sjónvarpið verða tvær sendingar gjørdar. Tær verða kliptar nú og væntandi sendar í januar.

Steintór Rasmussen sigur, at tey hava keypt upptøkutól og redigeringsmaskinu fyri stuttum. Við hesum fer Studio Pegasus spakuliga undir at gera sjónvarp.

### Nýggjur kapittul

Steintór Rasmussen sigur, at hetta er ein nýggjur kapittul í virkinum hjá Studio Pegasus. Frammanundan hevur upptøkustovan framleitt nøkur sjónbond við Nósa, Kulum Rótum og Trøllapæturi.

So Pegasus hevur nakrar royndir innan hetta økið frammanundan. Nú tykist sum hetta virksemið verður meira skipað, og at tey fara at leggja seg meira eftir at framleiða sjónvarp framyvir.

– Hetta er spennandi at fara undir, men vit vilja ikki spenna bogan ov høgt at byrja við. Vit fara spakuliga í gongd, og so fáa vit at síggja, hvat spyrst burturúr, sigur Steintór Rasmussen, ið ikki vil taka munnin ov fullan.

Pegasus hevur gjørt íløgu í sjónvarpsútgerð, og henda íløga skal sjálvandi geva nakað aftur. Steintór Rasmussen nevnir fleiri møguleikar at gera smærri upptøkur, ið ikki endiliga skulu latast sjónvarpinum.

– Vit eru opnir fyri øllum kreativum hugskotum, og tað kann t.d. vera videoløg og aðrar upptøkur til sjónbond. Tað er avgjørt grundarlag og tørvur á slíkari útgerð her norði, sigur Steintór.

Steintór nevnir eisini møguleikan at samstarva við Atlantis á hesum økinum, og tað hevur hann tosa við leiðaran í mentanarhúsinum um.

Enn er tó lítið ítøkiligt at frætta frá Pegasus. Staðfestast kann at slóðbrótandi upptøkustovan í Klaksvík hevur víðka virksemi við framleiðslu av sjónvarpstilfari.

Í dag eru eini fimtan fólk knýtt at Studio Pegasus, men eingin er í fulltíðar starvi. Pegasus byrjaði í 1998, og at byrja var tað bara eitt upptøkuhøli, og higartil hevur Pegasus framleitt tólv fløgur.

Síðani varð farið undir at gera útvarpssendingar fyri Rás 2. Hetta samstarvið var stutt, og síðani varð samstarv tikið upp við Útvarp Føroya, og nú tykist Pegasus at vera ein fastur táttur í útvarpsskránni.

Seinasti parturin av virkseminum hjá Studio Pegasus er sjónvarpsframleiðsla.